# BRAD PITT ER DREYMAMAÐURIN

Amerikanarar hava fingið 10.000 kvinnur at atkvøða fyri, hvør teirra dreymamaður er. Atkvøðurnar falla sjálvandi á teir kendu menninar í USA, og enn einaferð er tað sjónleikarin Brad Pitt, sum endaði ovast á listanum, har 100 nøvn verða nevnd.

Brad Pitt er serliga í kapping við tveir aðrar sjónleikarar – Jake Gyllenhaal og Orlando Blom, sum eru ávíkavist nummar 2 og 3 á listanum.

Hinvegin eru tað eisini aðrir kendir menn, sum mugu finna seg í at enda í hinum endanum av Topp 100. Teirra millum eru Russell Crowe og Will Young.

Brad Pitt hevur í nógv av verið darling hjá kvinnunum, og tað er hann framvegis, hóast hann er blivin nøkur ár eldri, er skildur frá konuni og hevur funnið sær eina nýggja kvinnu.



Ungi sjónleikarin Jake Gyllenhaal er nummar 2 á listanum



Brad Pitt er best umtókti maðurin millum 10.000 kvinnur í eini atkvøðugreiðslu

## HITLIST

### 15 tær bestu (ÚF)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | James Blunt | Goodbye My Lover |
| 2 | Robbie Williams | Advertising Space |
| 3 | Høgni Lisberg | Learn To Ride... |
| 4 | Kelly Clarkson | Behind These Hazel Eyes |
| 5 | Black Eyed Peas | My Humps |
| 6 | Poppkorn | Droymi Mitt Um Dagin |
| 7 | Amazonair | Beacause Tonight |
| 8 | Green Day | Jesus of Suburbia |
| 9 | Anna David ft. UFO | Når Musikken... |
| 10 | Shakira | Don't Bother |
| 11 | Fuzzphase | What's Wrong With You |
| 12 | Páll Finnur Páll | Grannin |
| 13 | Beyoncé ft. Slim Thug | Check On It |
| 14 | Petur Pólson | Timburmenn |
| 15 | Chris Brown | Run It |

### Tjeklisten (DR)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Mew | Special |
| 2 | Coldplay | Talk |
| 3 | James Blunt | Goodbye My Lover |
| 4 | Bryan Rice | No Promises |
| 5 | Franz Ferdinand | Walk Away |
| 6 | TV-2 | De Første Kærester på Månen |
| 7 | Kashmir | The Cynic |
| 8 | Madonna | Hung Up |
| 9 | Robbie Williams | Advertising Space |
| 10 | Mads Langer | Breaking News |
| 11 | Johnny Deluxe | Drenge Som Mig |
| 12 | Kent | Dom Som Førsvann |
| 13 | Bikstok Røgsystem | Radio |
| 14 | Tina Dickow | Give In |
| 15 | Nephew | Byens Hotel |
| 16 | Arctic Monkeys | When The Sun Goes Down |
| 17 | Foo Fighters | Resolve |
| 18 | Simple Plan | Untitled |
| 19 | Green Day | Jesus Of Suburbia |
| 20 | Amy Diamond | Shooting Star |

### Top of the Pops (BBC)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Notorius BIG/Diddy/Nelly | Nasty Girl |
| 2 | Chris Brown ft. Juelz Santana | Run It |
| 3 | Ordinary Boys | Boys Will Be Boys |
| 4 | Beyoncé ft. Slim Thug | Check On It |
| 5 | Dead Or Alive | You Spin Me Round |
| 6 | Hi-Tack | Say Say Say |
| 7 | Shayne Ward | That's my Goal |
| 8 | Arcitc Monkeys | When The Sun Goes Down |
| 9 | Will Young | All Time Love |
| 10 | Nizlopi | JCB Song |
| 11 | Sunblock | I'll Be Ready |
| 12 | Ashlee Simpson | Boyfriend |
| 13 | 50 Cent | Hustler´s Ambition |
| 14 | Richard Ashcroft | Breat The Night With Colour |
| 15 | Lee Ryan | When I Think |
| 16 | Jose Gonzalez | Heartbeats |
| 17 | Jesse McCartney | Heartbeats |
| 18 | Madonna | Hung Up |
| 19 | Bon Jovi | Welcome To Wherever You Are |
| 20 | A-ha | Analogue |

### Billboard

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Beyonce ft. Slim Thug | Check On It |
| 2 | The Pussycat Dolls | Stickwitu |
| 3 | Nelly og onnur | Grillz |
| 4 | Chris Brown | Run It |
| 5 | The All-American Rejects | Dirty Little Secret |
| 6 | Zac Efron & Vanessa Anne Hudgens | Breaking Free |
| 7 | Natasha Bedingfield | Unwritten |
| 8 | James Blunt | You're Beautiful |
| 9 | Fall Out Boy | Dance, Dance |
| 10 | Kelly Clarkson | Because Of You |
| 11 | Nickelback | Photograph |
| 12 | Ne-Yo | So Sick |
| 13 | Kayne West ft. Jamie Foxx | Gold Digger |
| 14 | Juetz Santana | There It Go |
| 15 | The Black Eyed Peas | My Humps |
| 16 | Eminem ft. Nate Dogg | Shake That |
| 17 | The Black Eyed Peas | My Humps |
| 18 | Ray J | One Wish |
| 19 | Fall Out Boy | Sugar, We're Going Down |
| 20 | Cascada | Everytime We Touch |

sound

## ØLL VILJA SPOTTAST



SPOT festivalurin í Århus hevur boðið bólkum at senda demofløgur inn, og festivalurin, sum er ætlaður nøvnum, ið eru á veg fram, hevur fingið eina ørgrynnu av umsóknum. 731 bólkar og solistar bjóða seg fram at spæla á SPOT festivalinum í ár.

– Vit eru imponerað av hesi stóru undirtøkuni, og nú fáa vit stóru uppgávuna at velja ímillum teir mongu bólkarnar, sigur Gunnar Madsen, leiðari fyri samtakið ROSA.

Teirra millum eru uttan iva eisini føroyskir bólkar, tí SPOT bæð eisini føroyingar senda umsóknir. Í fjør spældu fleiri føroysk nøvn á SPOT festivalinum – millum annað Teitur Lassen og Lena Andersen.

## STONES SENSURERAÐIR

Síðani gøluna fyri nøkrum árum síðani, tá ið songkvinnan Janet Jackson vísti ov nógv av sær sjálvari, hava fyrireikararnir av Super Bowl ansa væl eftir undirhaldinum í sambandi við størtstu ítróttarhendingina í USA. Í fjør var tann tryggi Paul McCartney kosin at spæla í hálvleikinum, og í ár vóru Rolling Stones á pallinum. Fyrireikararnir ansaðu tó væl eftir framførsluni hjá Mick Jagger og hansara harkaliðið, og tveir av trimum sangum vóru sensureraðir fyri orð, sum kundu virka stoytandi.



## MOSS OG FARRELL NÝTT PAR



Mynd: Scanpix

Bretska blaðið Daily Star skrivar, at supermodellin Kate Moss nú hevur funnið sær ein nýggjan mann, eftir buldraliga forholdið til tónleikarin Pete Doherty. Nýggi maðurin í lívinum hjá Moss skal sambært blaðnum verða Hollywoodstjørnan Colin Farrell. Felags fyri tey bæði er, at tey júst eru sloppin av við rúsevnismisnýtslu, og tey eiga bæði smá børn. Sambært Daily Star hittust tey bæði á einum hotelli í Miami herfyri.